## Eto'o var í øðini um íslendska innskifting

Álopsspælarin hjá FC Barcelona Samuel Eto'o var so illur, tá ið hann var skiftur út í dysti hjá Barcelona um vikuskiftið, at hann rýmdi av leikvøllinum. Tað var í hálvleikinum, at íslendski álopsspælarin Eidur Gudjohnssen var sendur á vøllin fyri Eto'o í Super Cup dystinum, og takkaði Eto'o fyri seg, og hann var ikki við til at taka ímóti steypinum fyri sigurin í dystinum. Hollendski venjarin Frank Rijkard vildi eftir dystin ikki gera stórvegis viðmerking, men segði at hann fór at tosa við Eto'o um hansara atburð.



## Grip hartar bretsku pressuna

Tord Grip, sum var hjálparvenjari hjá Sven-Gøran Eriksson, á enska landsliðnum, leggur harðliga eftir bretsku fjølmiðlunum og teirra arbeiðslagi.

– Teir góvu ongantíð Sven-Gøran ein kjans. Teir hava jagstrað hann og funnið upp á lygnir um hann. Sven-Gøran fekk ongantíð frið, og hann fekk heldur ongantíð tað viðurkenning, sum hann hevði uppiborið, sigur Tord Grip við Skysports.

Hann fjalir ikki út yvir, at tað var eitt sera stórt vónbrot fyri venjararnar, at Onglandi reyk úr HM-endaspælinum í fjórðingsfinaluni.

## Javnleikur var rætta úrslitið




Tað vóru báðir partar nøkulunda samdir um, tá Petur Reinert hevði bríkslað fyri seinastu ferð í gjár.

– Eg haldi at talan var um ein rættiliga javnan og taktiskan dyst, har tað í síðsta enda var upp á sítt pláss, at tað endaði við javnleiki, greiddi málskjúttin hjá B68, Julian Johnsson frá eftir dystin í gjár.

- Sjálvandi høvdu trý stig verið at fyritrekt, men nú er tað soleiðis, at vit nú hava fingið eitt stig aftrat og tað er positivt í mun til keðiligu úrslitini tveir seinastu dystirnar, so vit hava okkurt gott at byggja víðari á, segði Julian Johnsson.

Gøtuskurar høvdu ein eitt sindur beiskan smakk í munninum, tá vit hittu teir eftir dystin.

– Vit eru ikki nøgdir við javnleikin, men soleiðis sum dysturin bleiv, var tað helst eitt rætt úrslit, staðfesti Hanus Jacobsen hjá GÍ.

- Tó er tað harmiligt, at vit ikki fáa meiri burtur úr, tí úrslitini annars lagaðu jú seg til okkara fyrimun.

– Tað er heldur ikki nóg gott, at vit bara hava fingið tvey stig burtur úr dystum í móti VB/Sumba og B68, har vit helst kundu fingið seks. Sunnudagin er tað ÍF, og tá skulu vit helst hava trý stig, tá vit framman undan høvdu ætlað okkum nýggju stig úr hesum trimum dystunum, segði Hanus Jacobsen eftir dystin í gjár.

**Sí annars www.portal.fo har mál, hæddarpunkt og samrøður við Julian Johnsson og Hanus Jacobsen eru at síggja.**

**-rwd**

GÍ – B68 1-1 (0-0)

# Oyggjauppgerðin endaði við javnleiki

GÍ

B68

**B68 var betra liðið á vøllinum og hevði um nakar uppiborið trý stig, men kortini var tað GÍ, ið iðraði seg mest um mistu stigini, tá oyggjauppgerðin í Sarpugerði endaði við javnleiki**

FÓTBÓLTUR

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Soleiðis sum úrslitini lagaðu seg sunnudagin, kundi GÍ við einum sigri mánakvøldið móti B68 melda til aftur í oddastríðnum, og tí fóru skurarnir eftir øllum trimum stigunum.

Trý stig høvdu eisini verið rættiliga kærkomin hjá toftamonnum, tí við sigrinum á KÍ sunnudagin vaks gloppið upp til áttanda plássið, sum er garanturin fyri verandi sæti í Formuladeildini.

Dysturin var ein hálvan tíma gamal, tá fyrsti veruligi málkjansurin kom.

Tað var í samband við eitt hornaspark til B68, at Arnbjørn Danielsen royndi seg við stútara, men Áslakkur Petersen bjargaði á sjálvari málstrikuni, tá hann fekk vart bóltin upp á tvørtræið.

Undan tí var naskasta royndin frá heimaliðnum eitt skot úr 40 metra fjarstøðu frá Áslakki Petersen, sum smoygdi sær ein hálvan metur upp um yvirleggjaran.

Higartil var dysturin merktur av hørðum spæli, har ongin leikari bakkaði fyri nøkrum. Talan var ikki um skitið spæl, men leikararnir góvu seg fult út í hvørjari takling og hvørjum nærdysti.

Einar fimm minuttir eftir at B68-liðformaðurin royndi seg við stútara, var aftur vandi á ferð hjá Geza Turi í GÍ-málinum.

Nýggi brasiliumaðurin hjá B68, Alex Castilho, spælir eitt-tvey við Súna Fríða Barbá niðan eftir vinstra borði, har tað endar við at Alex Castilho langar til úr spískum, men Geza Turi verjir væl fyri góða skotinum.




*Øssur Hansen taldist millum raskastu leikararnar á vøllinum og fekk av tí sama pláss á vikuliðnum*

*Mynd Kjartan Madsen*

Fyrri hálvleikur leið nú í móti endanum, og onki mál kom áðrenn liðini fóru til hálvleiks. Hóast heimavallar fyrimun og møguleikanum um at gerast partur av oddastríðnum aftur, so var tað kortini B68, sum hevði havt størru møguleikarnar og hevði verið oman fyrra partin av dystinum.

### Sama mynstur

Í seinna hálvleiki sá sama mynstur, sum merkti stóran part av fyrra hálvleiki, út til at skula gera seg galdandi. B68 hevði bóltin meiri, men tað var tó sjáldan at talan var um gjøgnumspælt fótbóltsspæl. Heldur var tað nógv gyppari og fleiri nærdystir, har gestirnir ikki vóru petti aftan fyri skurarnar.

Einar tíggju minuttir fær B68 ein møguleika, eftir at Súni Fríði Barbá vann ein nærdyst við Niclas Niclasen, og leggur bóltin inn til Anderson, sum er vældekkaður og roynir at krúlla so frægt hann er mentur, men eina skotroynd bleiv tað ongantíð til.

Tá seinni hálvleikur er um at vera hálvrunnin, er tað Gunnar Nielsen sum er nærvið, tá Símin Luis Jacobsen hevði lagt honum ein góðan bólt.

Nakrar minuttir seinni er Alex Castilho nærvið í hinum endanum, men hansara heilfluktari eftir frálíka innleggið frá Kristian Anton Andreasen fer beint framvið málinum.

### Líktiskt málleysum javnleiki

Nú byrjaði dystarendin so smátt at nærkast og alt bendi á, at her fór at vera talan um ein málleysan javnleik.

Men tá fimm minuttir resta í av vanligu leiktíðini, fær B68 fríspark uttast í vinstra borði á miðjum vølli. Øssur Hansen, sum leikti ein sera góðan dyst, sendir bóltin inn í brotsteigin, har Julian Johnsson tveitir seg fram og næstan flúgvandi leggur hann B68 framum.

Nú vantaðu bert fimm minuttir av vanligu leiktíðini, og toftamenn byrjaði so smátt at tevja ein sigur.

Men málið, sum kom rættiliga óvæntað, fekk tað GÍ at ressast við. Teir umskipaðu seg nú og valdu at satsa frameftir, og tað gav úrslit.

Tá B68 var í álopi, men GÍ vinnur bóltin frá teimum. Poul Ennigarð og Símin Luis Jacobsen spæla síðani eitt-tvey sínamillum niðan eftir høgru síðu, áðrenn Símin Luis at enda leggur bóltin inn í feltið.

Har kemur innskifti Poul Arni Jacobsen rennandi, og tekur hann hegnisliga og temur bóltin og smekkar síðani til undir málverjan.

GÍ trýsti víðari fyri at fáa avgerandi málið og øll stigini. Tað var eisini um reppið, at hetta kom. Væl inni í yvirtíðini fær GÍ fríspark nakað inni á B&8-hálvuni.

Hanus Jacobsen leggur bóltin væl innfyri til Kaj Ennigarð, sum er púra leysur tveir metrar frá stongini. Hann fær høvdið á bóltin, sum hevur kós ímóti handaru stong, men fer framvið og út til málspark. Ein sera stórur møguleiki, og toftamenn sóu næstan eina stigi gleppa teimum av hondum í allar síðstu løtu.

Tað hendi tó ikki, men samstundis sum teir iðra seg um tey trý mistu stigini, so munnu munnu toftamenn kortini helst fegnast um, at teir ikki mistu javnleikin burtur í evstu løtu. Hinvegin iðra gøtumenn seg helst eisini, tí hóast B68 var nakað betri, so var tað kortini GÍ, sum hevði teir heilt stóru møguleikarnar at enda.

Javnleikur og eitt stig er ikki nakað, ið liðini fáa brúkt til tað stóra. B68 er nú fimm stig aftanfyri VB/Sumba, ið er omanfyri niðurflytingarstrikuna, og GÍ megnaði ikki í so stóran mun sum ætlað at minka um fjarstøðuna til oddaliðið og tey næstu liðini eftir EB/Streym.

## FAKTA

**GÍ – B68 1-1 (0-0)**

0-1: Julian Johnsson, 84.

1-1: Poul Arni Jacobsen, 90.

**GÍ:** Geza Turi – Áslakkur Petersen (Poul Andrias Jacobsen, 85), Niclas Niclasen, Kaj Ennigarð, Hanus Jacobsen – Símin Luis Jaocbsen, Poul Ennigarð, Gunnar Nielsen, Hans Jørgin Djurhuus – Jónreid Dalheim (Erling Jacobsen, 62), Sverri Jacobsen (Poul Arni Jacobsen, 72).

**Gul kort:** Gunnar Nielsen, Símin Luis Jacobsen.

**B68:** Tórður Thomsen (Mortan Hansen, 90) – Jóhan Petur Poulsen, Arnbjørn Danielsen, Ovi Magnussen, Øssur Hansen – Kristian Anton Andreasen, Jann Ingi Petersen, Julian Johnsson, Alex Castilho – Súni Fríði Barbá (Óli Olsen, 90. min), Anderson Castilho.

**Gul kort:** Anderson Castilho, Øssur Hansen.

**Dómari:** Petur Reinert.